## UTTAN ÚR HEIMI



# Kunnu Evropa og USA semjast?

**Hetta valumfarið hevur víst, at vit í Evropa eru um at missa alla frástøðu og objektivitet, tá vit tosa um USA í dag. Samanumtikið er USA eitt land við óendaligum kontrastum, og mangan er landið sjálvsmótsigandi. Í Europa og restini av heiminum halda tey mangan, at USA er ein stórur kapitalistiskur búffiloksi, ið bert ger vanlukkur fyri at tryggja sær egnan vinning. Spurningurin er í fyrstu atløgu um amerikanska valskipanin megnar at fáa talt atkvøðurnar rættstundis og til tíðina. Tøger Seidenfaden meinar á Politikken, at USA er eitt hótt fólkaræði, tí valskipanin hevur ongantíð verið so vánaligt sum nú, sjálvt um vit sóu gøluna í Florida í 2000**

KIM SIMONSEN

Amerikanarar eru óvitandi, mentanarleysir og feitir, siga vit mangan í Europa. Ein klassisk anti-amerikanisma. Myndin av USA er sum ein spegil, ið vit brúka fyri at rósa okkum sjálvum. Eftir kríggið í Irak og í Afghanistan er tað næstan ein konsensus um, at ein skal hata USA.

Anti-amerikanisman og vanligar atfinningar móti USA hevur nógvar røtur og orsøkir; nakrar eru skilagóðar, aðrar fordómar og mannahatur.

Farna dagin var enn ein óhugnalig sending um yvirdrivin feilt fólk í USA, hesaferð í Teksas. Tað er sjálvandi eitt vandamál, at fólk í ymiskum økjum í USA og ávísir bólkar eta seg til deyðis og bert koyra bil. Hetta rakar serliga arbeiðarastætttina, tey svørtu og ungdómin. Feittið er illa fordeilt, tí tað eru tey sum eru ringast fyri fíggjarliga og mentunarliga, ið eru feitast. Tað eru ikki Bush og Kerry og hansara ríku viðhaldsfólk, ið eru spikafeit. Tað eru ikki tey kendu og ríku, ið eru feit. Hesi somu sjónvarpsfólkini kundu eisini verið farin til Flordia, har tey flestu kløņu fólkini í USA búgva. Í Florida íðka fólk nógvan ítrott, ganga til vøddastyrking og sóla sær. Annahvønn dag er ein vakurleikakapping, ein "miss" ella "mister" okkurt í Florida. Í Florida hava tey sett útsjóndina í hæddina og hava lagt støði sera høgt. Tað er púra vanligt at genturnar, ið ofta koma frá Kuba og eru spansktalandi, fáa eina bróstoperatión ella rætta nøsina.

### Feitir bollar

Sjálvandi eru nógvir amerikanarar feitir og koyra við teirra stóru bilum út at eta eina ovurhondsstóra máltíð - men hendan myndin er eisini eitt sindur einsíðug og ein vit dáma í Evropa. Tað við hava sæð við hesum valstríðnum er at vit í Evropa skriva einsíðugt um USA. Tað er so deiliga lætt at siga sær sjálvum, at amerikanarnir eru nakrir feitir trúðarligir fanatikarar, ið hótta heimsfriðin við Bíbliuni og vápnum í hond. Man kann siga nógv um amerikanarar, men teir fara ikki til t.d. Evropa og senda óndar karikaturar av dønum, týskarum og fransmonnum í sjónvarpssendingum. Tað hevði verið lætt at sett niður á Eysturevropa, Turkaland sum vit vilja hava við í ES. Ella Danmark fyri teirra intoleransu yvir fyri innflytarum.

### Bergtekur, ørkymlar og øsir

Samanumtikið er USA eitt land við óendaligum kontrastum, og mangan er landið sjálvsmótsigandi. Í Europa og restini av heiminum halda tey mangan, at USA er ein stórur kapitalistiskur búffiloksi, ið bert ger vanlukkur fyri at tryggja sær egnan vinning. Soleiðis er USA eisini, men er so nógv meiri. Sum Kim Bildsøe Lassen, danskur journalistur í Washington, helt fyri, so:

"er hetta landið eisini optimistiskt, lívligt, og fólkini hava mangan eina støðu til heimin, fylt við kærleika. Hetta er ein tjóð, ið veruliga vil gera heimin til eitt betri stað at liva. Ein tjóð, ið hevur vítt millum veggja, ið vit onnur kunnu læra nógv av."

Hetta er niðurstøðan hjá honum í bókini: "Frihed og retfærdighed for alle - På sporet af et forandret USA", ið byggir á samrøður við 27 kendar amerikanarar eftir 11. septembur 2001, sum t.d. Robert D. Kaplan og Noam Chomsky.

At demonisera USA er so ótrúliga lætt - og primitivt. Hetta slagið av hugsan hevur helst fleiri øldir á baki, men serliga eftir annan heimsbardaga kom hetta meiri fram, har øll mótsjónarmið vórðu roknað sum primitiv, borgarlig, rasistisk, hjálandaveldishugan, mccartyistisk og tann reina Ísrael-USA-Lyonsklub bergtøka av USA. Men er hetta ikki líka so einsporað? Fyrst at demonisera eitt land við at "tala tað til rættis" sum eitt ónt ríki, og øll tey, sum eru í parti við tí.

Persónliga eri eg eingin ókritiskur USA-elskari, mangt dámar mær ikki við teirra mentan og politikki. Veit ikki hvat tað er, ið gevir mær hug at keypa ein ferðaseðil beinanvegin hagar. Sum Wallence Stevens helt fyri er veruleikin ikki tann, hann er, men er samansettur av teim mongu veruleikunum, ið vit kunnu gera hann til. Tankin er lív - og lættast er at skilja USA kensluliga heldur enn intellektuelt. Amerikanarar eru annað enn óvitandi, mentanarleysir og feitir, tað eru skjótt vit í Evropa, ið er tey óndu, ið liva við fordomum. Vit skulu ikki gloym at myndin av USA er sum ein spegil, ið vit brúka fyri at rósa okkum sjálvum. Eftir kríggið í Irak og í Afghanistan er tað næstan ein konsensus um, at ein skal hata USA.

*Keldur:*
*Kim Bildsøe Lassen: Frihed og retfærdighed for alle - På sporet af et forandret USA, 2002.*



Ung í MáF

Fyri tykkum, sum eru 15 - 25 ára gomul



Grundskeið í sjónleiki

í Hoyvíkar skúla
12.-14. november 2004
Kostnaður: 300 kr.

Lærarar: Birger Larsen úr Danmark
og Harpa Arnadóttir úr Íslandi

Meira fæst at vita frá Ungum í MáF:
Mariann: 269221, Martu: 224143,
Hans Jákupi: 224090, Binu: 508364,
Kenneth: 250783 ella frá MáF

Tilmelding hjá MáF í seinasta lagi 8. november 2004
☎ 315624 . maf@maf.fo

Jólapostur 2004

Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsinum í Tórshavn ikki seinni enn:

| | Flogpostur Brøv | Flogpostur pakkar | Skipspostur Brøv | Skipspostur Pakkar |
|---|---|---|---|---|
| Bretland | 16.12 | 15.12 | 02.12 | 02.12 |
| Danmørk | 20.12 | 16.12 | 09.12 | 09.12 |
| Finnland | 17.12 | 17.12 | 09.12 | 09.12 |
| Grønland, Nuuk | 16.12 | 16.12 | 25.11 | 25.11 |
| Ísland | 16.12 | 16.12 | senda ikki við skipi | |
| Noreg | 17.12 | 13.12 | 09.12 | 09.12 |
| Svøríki | 17.12 | 17.12 | 09.12 | 09.12 |

Freistirnar eru eisini at síggja á www.postur.fo
Upplýsingar um seinastu freistir til onnur lond og nærri upplýsingar um freistirnar til aðrar býir í Grønlandi eru at fáa á størstu posthúsunum

Innanlands
Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi týsdagin 21. desember

Tollgreiðsla
Tað er sera umráðandi fyri skjóta tollgreiðslu í móttakaralondunum, at vøruinnihaldið (gávurnar) í sendinunum verður skrivliga útgreina á tollsøgnina

Matvøra
Avmarkingar eru tá matvøra skal sendast til útheimin. Upplýsingar eru at fáa á posthúsinum, um hvat og hvussu nógv kann sendast í hvørjum pakka

Tilskriftarleysar sendingar í desember
Tilskriftarleysar sendingar kunnu sendast uttan eykakostna. Gjøldini og vanligu reglurnar eru at finna á www.postur.fo

Veðrið kann darva postflutningin
Sendið tí postin í góðari tíð
Postverk Føroya

Tilboðið heldur fram
Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar
2.087,-
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald.
Galdandi frá 04.11.2004 til 13.12.2004

Bílegging frá 01.11.2004 til 02.12.2004. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. 2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%. Til Danmarkar hósdag og heimaftur mánadag.

Bílegg ferðina hjá Atlantic Airways á 34 10 10 og á www.atlantic.fo ella á tínari ferðaskrivstovu.

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo
ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo
www.sansir.fo



BJARTI MOHR
Tórshavn, fyrst og fremst
- ein góð kommuna fyri øll
XA
FÓLKAFLOKKURIN